


*Nr. 7* **1. apríl 2018** **78. árg.**

# Hitt æviga lívið

*Jesus sigur: „Sanniliga, sanniliga sigi eg tykkum: tann, sum hoyrir orð mítt og trýr honum, sum sendi meg, hevur ævigt lív.“*
*Jóh. 5,24.*

At hoyra Jesu orð – ikki bara tey einstøku orðini, sum vit hoyra við oyrunum; men hoyra tað soleiðis, sum Pætur hoyrdi tað, tá ið hann har í fjøruni við Genesaretvatn varð kallaður til mannafiskara, meðan hann sat og reinskaði gørn; og tollarin Levi, tá ið Jesus kom fram við tollbúðini og kallaði á hann, so hann - eins og Pætur - ikki kundi annað enn lata alt liggja og fara í fylgi við Jesusi. **Hetta er hitt æviga lívið.**

At tú fert at hoyra orð hansara, so tú trýrt tí, fer fullkomiliga at endavenda tilveru tíni. Tað merkir nevniliga, at tú byggir lív títt á tað, ikki bara hoyrir tað, men eisini gert eftir tí í áliti á, at tað, sum Jesus sigur í orði sínum, er sannleikin um lív títt.

At vera stillur fyri Harranum er ikki ein óvirkin støða, har alt liggur stilt; men tað er ein støða, sum eitt menniskja kemur í, um tað byggir á Orðið og ger, sum Orðið sigur. Tá ert tú lurtandi eftir, hvat Gud vil við lívi tínum, og ert íðin eftir at gera hareftir, so at tú bindur lív títt til hansara, sum sjálvur er lívið.

Í dag er páskadagur. Páskir merkir millum annað, at vegur er opnaður fyri tær gjøgnum syndarinnar og deyðans myrkur. Bæði kring teg og í tær er vald hins ónda brotið, og tú hevur fingið møguleikan at fylgja tí upprisna, so tú longu her fært æviga lívið til ognar.

***Hann á krossinum aleina***
***øll mín vón og gleði er;***
***hvat so aðrir vilja meina,***
***hann hjá mær av øllum ber.***
***Ongin tann, sum nevnast kann,***
***gjørdi mær so stórt sum hann.***
***Hann kann meg við Gud sameina,***
***hann á krossinum aleina.***

# Og Harrin var við honum

*Og Sámuel kom til mans, og Harrin var við honum og læt onki av øllum orðum sínum falla til jarðar.*

*1. Sám. 3,19.*

„Minst til, at kristindómurin bara er eitt ættarlið frá at verða útruddaður," segði Thorkild Græsholdt, biskupur, einaferð. Har hugsaði hann um, at um alt viðvíkjandi Jesus ikki verður frásagt, so verður tað gloymt. Tað sást týðiliga í gamla Sovjet-samveldinum, har roynt varð at rudda út gudstrúnna hjá russarunum. Børnini skuldu onki hoyra um Gud, tí so mundi trúgvin fara at hvørva, hildu fólk. Tað sá eisini út til at fara at gangast sum ætlað.

Tað var bara eitt, sum kommunistarnir høvdu gloymt. Tær gomlu ommurnar. Tær vildu ikki akta myndugleikarnar, og tær fortaldu ommubørnunum um Gud, nú foreldrini ikki vildu ella tordu. Gud kallaði altso ommurnar fram og legði teimum orð sítt í munnin, eins og Gud einaferð hevði kallað Sámuel fram, og við honum sum amboð ikki læt eitt einasta av orðum sínum falla til jarðar.

Soleiðis er trúgvin hildin livandi. Líka frá tá ið Paulus gjørdi Jesus kendan, so at trúgvin á hann breiddi seg í allar ættir, eisini norður higar til Føroya. Men tað var hvørki kongur ella tað at byggja kirkjur, sum festi lív í trúnna. Tað gjørdi frásøgnin frá hjarta til hjarta. Heldur ikki í dag er tað nóg mikið, at kirkjur eru allastaðni, og at mentanin er merkt av kristindóminum. Nei, Heilagi Andin má gera trúnna á tann krossfesta og upprisna Jesus livandi í hjørtum okkara, tí vit kunnu ikki av egnum viti ella mátti trúgva á Jesus Kristus ella koma til hansara. Men lurta kunnu vit, og soleiðis byrjar tað!

***Føgur var fjøldin, ið forðum fann
frelsu í fedranna kirkju,
nú kemur framtíðin okkum ann,
kristnaður ungdómur einans kann
vera vár vón og várt virki.***

# Kærleikin

*Mikil vøtn kunnu ikki kærleikan sløkkja. Hásongurin 8,7.*

Kærleikin er sterkur sum deyðin. Honum stendst ikki ímóti. Hann rámar menniskjað í hjartað og dregur tað at Gudi. Kristi kærleika kann onki vald sløkkja. Getsemane og Golgata megnaðu tað ikki, og Kristi kærleiki er hin sami í dag. Jesus kom til menniskju, men tey tóku ikki ímóti honum, tá ið hann kom. Hann varð vanvirdur og vrakaður. Men kærleiki hansara var óbroyttur. Fólk rópaðu: „Burtur við honum! Krossfest hann!“ Men kærleiki hansara var hin sami.

Og eftir uppreisn sína álegði hann lærusveinunum at boða gleðiboðskapin í Jerusalem, har tey høvdu vrakað hann.

Eru vit fylt við kærleika hansara, kann heimurin heldur ikki sløkkja hann. Heimsins atfinning og mótstøða megna ikki at oyða kærleikan í teim hjørtum, sum hava upplivað, at Harrin er góður. Vit hava høvi at elska menniskju, og vit kunnu fáa evni til hetta, við tað at vit dagliga lata andan úthella Harrans kærleika í hjørtum okkara. Lat Jesus elska teg, og tú elskar menniskju.

*t.* týddi.

---

Tað eru ikki øll í kirkjuliðinum, sum skulu leiða. Tað mundi vera Westley, sum segði: ”Tað er møguligt at tæna uttan at leiða, men tað er ikki møguligt at leiða uttan at tæna.” Kristus er høvur kirkjuliðsins, og vit eru limirnir, sum skulu gera tað, høvdið gevur boð um, og kunnu tí bara vera eyðmjúk og tænandi. Jesus gav okkum eitt fyridømi. Hann gjørdi trælaarbeiði, tá ið hann bendi seg niður og vaskaði føturnar á lærusveinunum.

e. c. ums.

# Alt kann broytast

Hevur tú tað trupult júst nú? Tað finst neyvan nakar vøkstur uttan trupulleikar. Lív títt kann framvegis vera til íblástur fyri onnur. Lít á Gud. Tak móti hjálp frá vinum. Og trúgv, at alt kann broytast ein nýggjan veg í Guds veldugu hond.

Gud kann loyva, at okkurt verður rivið niður, so okkurt nýtt kann verða bygt. Hann loyvir sárum, so okkurt kann lekjast. Hann letur summi ganga í myrkri, so tey kunnu síggja ljós hansara. Hann loyvir, at tú gerst einsamallur, so tú kanst fáa Jesus sum vin. Hann letur teg gerast ovfarnan, tí hann vil læra teg sannleikan. Hann lærir teg, at hetta lívið er lítið afturímóti tí, sum bíðar tær har heima í dýrdini hjá Gudi.

Í Bíbliuni lesa vit, *„Men vit vita, at allir lutir samvirka til góða hjá teimum, sum elska Gud, teimum, sum eftir ráðagerð hansara eru kallað.“* (Róm. 8,28).

---

„Eg havi jú sagt við teg: Ver reystur og hugdjarvur og ver uttan ótta og ekka, tí at Harrin, Gud tín, er við tær á øllum leiðum tínum.“ Jós. 1,9. Sum Gud gav Jósva boð um at vera djarvur og sterkur, soleiðis gevur Gud eisini tær somu boðini. Brúka tvíeggjaða svørðið, sum Harrin hevur givið tær, og slá um teg við Guds lyftum. Við andans svørði, sum er Guds orð, skalt tú ganga frá sigri til sigurs. *e.c.* ums.

---



## SUNNUDAGSBLAÐIÐ

***ynskir øllum einar gleðiligar páskir í Jesu navni!***

***Heilsan Blaðstjórin.***



---

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 1. apríl | Tekstur: | Luk. 24,13-35; | bíbliuorð: | Luk. 24,34b |
| 8. apríl | Tekstur: | Dóm. 6,1-3+ 11-16+25-31; | bíbliuorð: | Dóm. 6,16b<br>ella 5. Mós 31,8 |

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Karl N. Hansen, Torvheyggur 19, Tvøroyri.
**Umbróting & prent:** Prenta – 35 77 74




*Nr. 8* *15. apríl 2018* *78. árg.*

# Forhangið í templinum skrædnaði

Kristus leið... fyri at hann kundi leiða okkum til Guds (1. Pæt. 3,18), og skrædnaða forhangið í templinum er tekin um, at nú er onki, sum forðar. Kristus hevur einaferð fyri allar borið tað fullkomna ofrið, og við frímóði kunnu vit stíga fram fyri Gud í Jesu navni.

**Men har er eitt *áklæði* afturat, sum má burtur.** Um deyði Jesu Krists fyri mong menniskju bara er ein syrgilig hending, sum tey standa langt burturfrá og hyggja at, **kemst tað av, at áklæðið ikki er tikið burtur.** Tey standa bara og hyggja at, men tað veruliga síggja tey ikki.

Hvat er tað veruliga? Tað veruliga er, at Gudi tykir synd í tí menniskja, sum er skuldarbundið. Enntá ein deyðadømdur brotsmaður, sum viðgongur skuld sína, kann fáa at vita, at hann sleppur at vera saman við Jesusi í Paradís. Tað veruliga er altso, at **skuldarbræv okkara er neglt á krossin, og at djevulin er ein sligin fíggindi.**

Tá ið tað verður framborið soleiðis, er harvið eisini sagt, at bara skuldarar kunna av hjarta syngja: **„Heilur, frelsari og Kristur!“** Skulu vit fáa tað veruliga at síggja, má Heilagi Andin, sum sannførir um synd, taka áklæðið burtur og dýrdargera Jesus, so at vit fáa at vita, hvat Gud í náði síni hevur givið okkum.

Á páskum, størstu hátíðini í kirkjuárinum, er tíð uppá at biðja um vegleiðing Heilaga Andans at leiða okkum til Guds. Forðingarnar eru burturi, forhangið er skrædnað, og alt er til reiðar. Ver ikki vantrúgvin! Bara trúgvin sær Guds dýrd,

soleiðis sum hon er sýnd okkum í tí krossfesta og upprisna Jesusi Kristi. Júst við krossin vellir trúgvin fram í takkarsangi, **tí at har er tað staðfest, at forhangið er skrædnað.**

> ***Jesus, mín trúfasti Harri og kongur,***
> ***øllum, tú vanst mær, eg taki ímót!***
> ***Ei vil eg tærast av ivanum longur;***
> ***Tú hevur lovað at leiða mín fót.***

# Himmalvegurin

Tá ið fólk verða frelst, verður viðhvørt sagt, at tey eru komin inn á Himmalvegin, tann vegin, sum førir til Himmals. Og hvussu finna vit so tann vegin. Jesus sigur: „Eg eri vegurin, sannleikin og lívið. Eingin kemur til faðirin uttan við mær." Tað byrjar altso við Jesusi, at vit bjóða honum inn í hjarta okkara. „Men so mongum, sum tóku ímóti honum, teimum gav hann mátt til at verða Guds børn." (Jóh. 1,12)

Nú eru vit á vegnum. Tá ið vit koyra á vegunum her niðri, kunnu vit verða steðgað av ferðslupolitinum og vinkað til viks. „Á, nei", suffa vit, „hetta kann koma at taka tíð og kosta." Men politiið sigur: „Tað er fyri tína egnu skuld, at vit steðga tær. Bilur tín kann vera ein deyðsfella." Og tað er jú rætt.

Fram við vegunum her niðri eru ferðsluskelti, sum best er at akta. Tað eru tað eisini á Himmalvegnum; men eg ætli mær at siga frá nøkrum skeltum, sum ikki eru á Himmalvegnum. Summastaðni her niðri eru skelti, sum merkja „Innkoyring bannað". Eitt slíkt skelti finst ikki á Himmalvegnum. Har eitur tað afturímóti: „Hvør tann, sum ákallar navn Harrans, skal verða frelstur." (Róm. 10,13) Hvør tann, øll. Øll, sum vilja, kunnu stíga inn á vegin, her er einki forboðsskelti.

Tá ið vit koyra gjøgnum tunlar, so skulu vit gjalda, stendur á einum skelti. Men á Himmalvegnum stendur: „Tí av náði eru tit frelstir, við trúgv, og tað er ikki tykkum at takka, tað er Guds gáva; ikki av gerningum, fyri at eingin skal rósa sær." (Ef. 2,8-9) Her skal altso einki gjaldast, hetta er ein gáva frá Gudi.

Onkustaðni sært tú eitt skelti, har tað stendur, at bilurin má ikki vera tyngri enn 3,5 t og bert hava fýra hjól. Eitt slíkt skelti er ikki at finna á Himmalvegnum. Her í verðini møta vit

nógvum trupulleikum og knógva undir tungum byrðum, men Jesus sigur: „Komið higar til mín øll tit, sum arbeiða og ganga undir tungum byrðum, og eg vil veita tykkum hvílu.“ (Matt. 11,28)

Hoyr, hvussu undurfult tað er: „Hann (Jesus) hevur vígt okkum atgongd til ein nýggjan og livandi veg inn gjøgnum forhangið,“ (Hebr. 10,20) og „Tú leiðir meg við tínum ráðum og tekur meg síðani til dýrdar!“ (Sálm 73,24).

Himmalgøtan er eingin blindgøta, nei, hon førir allan vegin líka yvir til Perluportrið.

Ja, so sanniliga: „Hann, sum byrjaði í tykkum góðan gerning, vil fullføra hann.“ (Fil. 1,6).

*Effie Campbell* umsetti.

# Friðarheilsan

*Friður veri við tykkum! Jóh. 20,19.*

Við hesi heilsan hitti Harrin lærusveinar sínar páskakvøld. Hetta var tann vanliga heilsanin, men hann fylti hana við nýggjum innihaldi. Veruleikin, at hann hevði sigrað á deyðanum og var risin upp búði undir heilsanini. Harrin hevði vunnið á øllum tí, sum órógvar menniskjans frið. Hann bar fram meira enn eitt ynski. Hann gav teimum eina signing.

Alt hetta, sum umringaði teir – mótstøða og fíggindskapur menniskjans – hevði eisini verið Harranum fyri, og hann hevði sigrað. Hann segði teimum tá, at hetta ikki var ført fyri at oyðileggja teir. **Deyðin var ikki hitt seinasta, men lívið.** Um teir doyðu ella livdu, vóru teir tryggir, tí teir vóru hansara.

Og hann sendi teir við somu heilsan út til gerning sín, eins og faðir hansara hevði sent hann. Eins og hann hevði sigrað, skuldu teir eisini sigra, tó at vegurin lá um líðing og deyða. Í øllum gerningi teirra skuldi hann vera við teimum, eins og faðirin var við honum.

Men Harrin hevur eisini heilsað okkum líka frá okkara dópsstund við somu heilsan. Eisini í dag hevur hann heilsað okkum. Hann, sum hevur vald í himli og á jørð, fylgir okkum, sum hóast alt krøkja okkum upp í hann, og á sama hátt, sum vit trúgva á hann, skulu vit sanna, at friður hansara er við okkum.

*t.* týddi.

# Kumpassplantan

Hevur tú hoyrt um kumpassplantuna? Hon veksur í Texas. Minnir um eina sólblómu og verður fleiri metrar høg. Tað serliga við kumpassplantuni er, at bløðini venda í suður-norð. Við at hyggja at kumpassplantuni, finnur tú ættina, hóast myrkt er.

Men tað løgna er, at tá ið kumpassplantan eldist, er hon ofta ikki álítandi longur. Tá kann hon lættliga peika í allar ættir.

Eg komi at hugsa um, hvussu syrgiligt tað er at síggja eldri menniskju, sum hava mist ættarskilið í lívinum og ikki halda seg til tað, tey hava lært. Tí eiga vit at biðja til Guds fyri teimum. (Sálmur 119,27). ***Lat meg skilja vegin í boðum tínum, at eg kann grunda um undur tíni!***

# Hevur tú selt arvasilvuri?

*Títt orð er, Gud, várt arvagóðs,*
*tann arv vit bestan fingu,*
*í grøv veit okkum, Gud, tað rós,*
*at leidd av tí vit gingu ...*

Skulu vit verða leidd fram gjøgnum lívið, mugu vit fylla okkum við Guds orði. Les ein kapittul úr Orðtøkunum hvønn dag. Har eru 31 kapitlar, so tað svarar til hvønn dag í einum mánaði. Les síðani ein kapittul úr onkrum øðrum teksti í Bíbliuni, sum tú lesur samanhangandi. Les hart, so tú eisini ført tað inn gjøgnum oyrað. *e.c.* ums.

---

**Sunnudagsblaðið** er nú eisini at finna á alnetinum á donskum og enskum. Sigið skyldfólki og vinum í útlondum frá hesum. Adressan er: **www.jesus4all.dk**

---

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | |
|---|---|---|
| 15. apríl | Tekstur: Dóm. 7, 1-4+9-21; | bíbliuorð: Jes. 41,10 |
| 22. apríl | Tekstur: Rut. 1,1-5+16; 2,11-12; 4,9; | bíbliuorð: Jes. 49,15d-16a |

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Karl N. Hansen, Torvheyggur 19, Tvøroyri.
**Umbróting & prent:** Prenta – 35 77 74